

## Metstórur norskur fiskaútflutningur

Norðmenn hava ongantíð selt so nógvar fiskavørur av landinum sum fyrra hálvár í ár. Frá nýggjárinum til 30. juni seldu teir fisk og fiskaúrdráttir av landinum fyri 17,8 milliardir norskar krónur, og tað var sambært hagstovuni í Oslo 57 milliónir krónur meiri enn methálvárið í fjør. Juni royndist harafturímóti verri enn juni í 2007. Útflutningurin í síðsta mánað var 2,6 milliardir krónur, og tað var 76 milliónir krónur minni enn í juni í fjør. Tað eru serliga keypararnir í Póllandi, Russlandi, Nigeria og í Ukraina, sum hava keypt meiri fiskavørur úr Noregi í ár enn í fjør, og tað eru serliga laksur, síl og sild, sum gera mun.

# kið er missrøkt

*Dánjal Jákup Olsen, Kollafjørður. Dánjal Jákup Olsen og kona hansara, Selma Olsen, fáa heimahjálp frá sambýlinum í Kollafirði. – Vit hava tosað um tað, og vit halda tað vera ringt. Vit hava bara heimahjálp einaferð um vikuna, og tað er øðiliga keðiligt. Selma er sjúk í rygg og hjarta, og eg eri 81 ára gamal og havi havt tríggjar skurðviðgerðir. Vit skulu keypa inn, men vit sleppa ikki at ganga og koyra. Vit eru ógvuliga veik. Vit halda tað vera vánaligt, at vit ikki fáa meiri hjálp. Øðiliga vánaligt*



ar og fýra brúkarar um dagin, og tá eg eri úti og arbeiði, so eri eg bara úti, sigur ein heilsuhjálpari á sambýlinum í Skopun og greiðir eisini frá, at tey hava fólk, ið fara út eftir klokkan tvey at gera reint, tá heimahjálpin fær frí.

### Eldrasambýlið í Kollafirði

Fýra fólk arbeiða í dagtímunum á sambýlinum, meðan ein arbeiðir úti á økinum. Áður vóru tvær økisvaktur, ið møttu klokkan átta og vórðu lidnar klokkan tvey. Sum nú er, er bara ein økisvakt, og hon hevur nú ein átta tímars arbeiðsdag og skal eisini aftur at hjálpa til á sambýlinum. Dagvaktin er eisini einsamøll um at gera reint hjá brúkarunum, hóast tey á sambýlinum í Skopun hava eyka fólk, ið eisini gera reint.

- Heimarøktin hevur hvørki fólk ella orku at vaska, og tað alt ov vánaligt, at vaskifólk ikki verða sett eyka. Ein heimahjálp er ikki ein vaskikona – um mann ætlaði at vaska, so hevði mann søkt eitt vaskistarv, sigur Sølva Ford.

### Fólk innan eldrarøkt tiga

- Trupulleikurin er, at eldraøkið koyrir líka illa, sum sjúkrahúsverið. Sjúkrahúsverkið verður blást upp í fjølmiðlunum, og tí vita øll, hvussu illa tað stendur til, meðan fólk innan eldraøkið tiga, sigur Sølva Ford.

- Eingin torir at siga nakað, tí at tey eru bangin fyri at missa starvið, og í síðsta enda gongur alt út yvir tey gomlu. Tey hava goldið skatt alt lívið, og hetta fáa tey afturfyri, sigur heilsuhjálparin.

- Dagvaktin á sambýlinum í Kollafirði er so stressað, at hon verður noydd at skumpa uppgávurnar víðari til kvøldvaktina, ið noyðist tá at senda víðari til náttvaktinum. Tískil hevur eingin tíð at veruliga vera saman við teimum gomlu. Tey gomlu eru einsamøll, sigur Sølva Ford.

- Vit hava ov fá røktarheim. Sjúkrahúsverkið letur bara okkum sjúklingarnar, og vit hava ikki starvsfólk at nøgda hesum tørvinum. Vit eru eitt sambýli og ikki eitt røktarheim. Tað er mítt hjartasuff, at tey gomlu iki verða nøgdaði. Eg lati gjarna vaskiklæðini bíða fyri at sita saman við teimum og práta við tey.

- Eg hevði ikki viljað verið gomul í Føroyum í dag, endar Sølva Ford.



*Kala Djurhuus, Kollafjørður. Kala fær heimahjálp frá sambýlinum í Kollafirði. – Eg havi ein skaða í beininum, so eg burdi fingið viðgerð, men tað er sjáldan komið fyri, at eg havi fingið tað frá heimahjálpini, og eg havi slett einki fingið frá nøkrum øðrum. Tær skulu bara skunda sær, siga tær. Áðrenn heimahjálpin varð niðurskorin, fekk eg reingerð einaferð um vikuna, nú fái eg viðhvørt bara tvær ferðir um mánaðan. Eg føli væl, at tær ikki hava nóg góða tíð og hava skund.*